


*– Í løtuni er gott pláss við bryggjukantin, men tað hendir meiri enn so, at tað er trongligt, tó at vit hava eitt stórt havnalag, sigur havnarstjórin í Fuglafirði, Rólant Højsted*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Eingi stór skip á Fjørð uttan loðs

**Uppgávurnar hjá Rólanti Højsted, havnarstjóra, eru mest inni á skrivstovuni, har hann skal samskipa arbeiði og skriva rokningar fyri gjøld og ymiskar tænastur. – Umframt tað dagliga við skipum, er tað eisini okkara uppgáva at ansa eftir, at havnalagið er reint og ruddiligt, sigur havnarstjórin**

Vilmund Jacobsen

Hósdagin var Sosialurin inni á gólvinum á Havnarskrivstovuni í Fuglafirði, har vit hittu Rólant Højsted, sum er havnarstjóri í Fuglafirði, men býr á Eiði.

Hann hevur røkt starvið sum havnarstjóri síðan í januar 2009. Aftrat sær hevur Rólant tveir havnarumsjónarmenn, og tá mest er at gera, noyðast teir eisini at hava onnur fólk til hjálpar, sum ringt verður eftir. Hetta er serliga, tá stór skip koma á Fuglafjørð og tørvur eitt nú er á loðsi.

Hendan dagin, vit gingu eftir bryggjuni saman við havnarstjóranum, lógu trý stór skip á Fuglafirði. Uppisjóvarskipið Jupiter, og síðan ein stórur russiskur trolarin, sum lá uttaná einum stórum farmaskipi, ið tók ímóti svartkjafti hjá trolaranum.

Ein annar stórur russiskur trolari hevði júst verið á Fuglafirði og hevði umskipað veiðina umborð í farmaskipið, men hesin var farin nýggjan túr.

– Nú svartkjaftakvotan er so lítil, verður eisini avmarkað, hvussu nógv virksemi verður av slíkum slag í ár, sigur havnarstjórin.

## Pappír og fyriskipan

Uppgávurnar hjá Rólanti Højsted eru mest inni á skrivstovuni, har hann skal samskipa tað arbeiði, sum gerast skal við bryggjukantin. Hann hevur eisini til uppgávu at skriva út rokningar fyri ymisk gjøld, ið skipini, sum koma á Fuglafjørð, skulu rinda, eins og fyri tær veitingar og tænastur, sum tey fáa frá Fuglafjarðar havn.

– Í løtuni er gott pláss við bryggjuna, men tað hendir meiri enn so, at tað er trongligt, tó at vit hava eitt stórt havnalag.

Hann vísir á, at tá stórar bunkringar, landingar til Havsbrún og skip liggja við bryggju og umskipa veiði umborð á stór farmaskip – og at alt hetta fer fram samstundis – ja, tá kann bryggjukanturin viðhvørt gerast ov lítil. Tað kemur meiri enn so fyri, sigur hann, at teimum vantar pláss við bryggjuna.

Rólant sigur, at nakrar landingar vóru til Havsbrún í februar og mars. Hetta vóru serliga íslendsk og norsk skip, umframt føroysk skip, sum eitt nú fiskaðu lodnu í Íslandi.

– Annars var januarmánaði slakur, men hinir báðir, februar og mars, hildu stand, leggur hann aftrat.

## Ymiskar uppgávur

Men hvat gera fólk á eini Havnarskrivstovu ella niðri á bryggjuni, tá friðarligt er við havnarlagið?

– Vit hava eisini um hendi ymiskt viðlíkahald av havnini, eins og okkara uppgáva er at ansa eftir, at havnalagið er reint og ruddiligt. Tey, sum hava virksemi við havnalagið, skulu halda skil á sínum øki.

Rólant sigur, at uppgávan er eisini at taka ímóti spillolju og burturkasti frá skipum, eins og hesi skulu bindast og loysast, tá tey koma og fara.

– Tá mest er at gera, skulu kanska eini 10 skip avgreiðast eitt vikuskifti, og tað er eisini komið fyri onkuntíð, at tey øll skulu hava loðs, leggur hann aftrat.

## Krevja loðs

Havnarstjórin vísir á, at tað er ikki vanligt, at føroysk skip skulu hava loðs, tí tey vanliga eru staðkend.

– Hinvegin skulu mest sum øll stór fiski-og farmaskip, sum koma á Fuglafjørð, hava loðs, og sama er